# Vegleiðing til dagstovnar
# um nýtslu av myndum og upptøkum

## Hvat kann vegleiðingin hjálpa tær við?

Vegleiðingin er serliga ætlað tykkum, sum arbeiða við børnum í antin vøggustovu, barnagarði ella frítíðarskúla, og sum ynskja at nýta myndir og upptøkur í samband við tykkara arbeiði.

Tit kunnu nýta vegleiðingina til at tryggja, at tit halda dátuverndarlógina í samband við nýtslu av myndum av bæði børnum og starvsfólki. Vegleiðingin umrøður myndir, men reglurnar eru tær somu fyri nýtslu av upptøkum.

Vegleiðingin hevur góð ráð og dømi, og aftast eru viðkomandi ásetingar.

### Ráð nr. 1: Tak støðu til nýtsluna av myndum

**Tak støðu til, hví tit taka myndir, og hvat tit ætla at nýta myndirnar til. Tá endamálið er komið uppá pláss, skulu tit avmarka nýtsluna til júst tey endamálini.**

**Tað kann t.d. vera, at tit ynskja at stuðla dagliga námsfrøðiliga virkseminum við myndum av tí, sum fer fram, ella tit ynskja at lýsa gerandisdegin hjá børnunum fyri foreldrunum ella lýsa stovnin á heimasíðuni.**



## Dømi:

### ✓ Mynd á klædnarúm

Tit kunnu seta myndir av barninum á klædnarúm og líknandi uttan samtykki frá foreldrum.

### ✓ Hanga bólkamyndir í stovninum

Tit kunnu hava bólkamyndir, eisini gamlar bólkamyndir og myndir frá serligum døgum hjá stovninum, hangandi í stovninum uttan samtykki frá foreldrunum og starvsfólki. Tit kunnu hava myndir í stovuni av einstøkum børnum ella saman við starvsfólki t.d. myndir frá útferðum til at stuðla námsfrøðiliga virkseminum uttan samtykki frá foreldrum og starvsfólki.

## √ Skjalprógvan av námsfrøðiliga virkseminum

Sum heild kunnu takast myndir av einstøkum børnum ella saman við starvsfólki. Hesar kunnu goymast uttan samtykki, tá tað er neyðugt fyri at menna og skjalprógva námsfrøðiliga virksemið. Avmarkið tykkara myndanýtslu og goymið so fáar myndir sum gjørligt.

## √ Nýtsla av myndum á uppslagstalvu, skíggja og foreldrainnanneti

Tit kunnu lógliga, og uttan samtykki frá foreldrum og starvsfólki, taka myndir av einstøkum børnum ella saman við starvsfólki, og deila tær á uppslagstalvu, talgildum skíggjum á stovninum ella á einum lokaðum foreldrainnanneti, fyri at geva foreldrunum innlit í gerandisdagin hjá børnunum.

## √ Bólka- og andlitsmyndir tiknar av myndatakara

Um myndatakari kemur á stovnin at taka bólka- og andlitsmyndir av børnum og møguliga eisini starvsfólkum, er tað myndatakarin, ið hevur ábyrgd av viðgerðini av myndunum. Eftirsum børn og foreldur fáa fráboðan um myndatøkuna áðrenn og hava møguleika at velja, at barnið ikki skal avmyndast, er ikki neyðugt hjá myndatakara at fáa samtykki.
Aftaná kunnu tit, uttan samtykki frá foreldrum og starvsfólki, hanga bólkamyndirnar upp og møguliga eisini andlitsmyndirnar hjá starvsfólkunum.

## √ Myndabók til barnið, tá tað gevst á stovninum

Tit mugu gjarna, uttan samtykki frá foreldrunum, goyma serstakar myndir av hvørjum barni, í tíðarskeiðnum barnið gongur á stovninum, við tí endamáli at gera eina myndabók til barnið, tá tað gevst t.d. fer úr barnagarði í skúla.

## √ Leggja myndir alment á netið

Tit skulu vera serliga varin, um tit ætla at leggja myndir av børnum og/ella starvsfólki á alnetið. Men er talan um meinaleysar myndir, sum t.d. myndin niðanfyri, har tað ikki ber til at eyðmerkja einstaklingar, kunnu tit uttan samtykki leggja myndirnar á heimasíðuna hjá stovninum.

### Ráð nr. 2: Hav skil á trygdini



1. Set kotu á eindina (t.d. telefon ella teldil), sum tit taka myndir við og goyma myndir á.
2. Eindin skal vera bronglað.
3. Goym ikki kotur nær við eindina.
4. Ger eitt yvirlit yvir eindir, ið tit goyma myndirnar á, og hvør hevur atgongd til eindirnar.
5. Minst til at strika í samsvar við hesa vegleiðing (eftir 2 - 4 vikur).
6. Avtala, at starvsfólkini ikki taka myndir við teirra egnu telefonum, men nýta telefonina ella eindina hjá stovninum.

## Ráð nr. 3: Strika støðumyndir aftaná 2 – 4 vikur



Um myndirnar bara skulu nýtast til at geva foreldrum innlit í gerandisdagin hjá børnunum t.d. umvegis tykkara innannet ella umvegis talgildar skermar í tykkara hølum, eiga tit at strika myndirnar aftaná 2 - 4 vikur. Um tað er gjørligt, at myndirnar verða strikaðar sjálvvirkandi, er tað gott hugskot. Foreldur kunnu heinta myndirnar av innannetinum í hesum tíðarskeiði, um tey ynskja at goyma tær.
Tit hava ikki ábyrgdina av nýtsluni hjá foreldrum av myndum.

## Ráð nr. 4: Strika myndirnar

Syrg fyri, at myndirnar javnan verða strikaðar av telefonini ella eindini, sum tær vórðu tiknar við, t.d. eftir at myndirnar eru lagdar á innannetið.

## Hvat annað skulu tit geva tykkum far um?

### √Niðrandi myndir

Tak ikki myndir av børnum, sum eitt nú eru á ves, skifta blæu, eru óð, gráta ella eru í øðrum viðkvæmum støðum. Bæði tá talan er um børn og um starvsfólk, er neyðugt at hava í huga, at myndin skal vera meinaleys og ikki niðrandi.

### √Strika myndir

Um foreldur ynskja, at myndin skal strikast, skulu tit strika hana, uttan so, at tað er serstøk orsøk til ikki at strika. Tað sama er galdandi fyri myndir av starvsfólki.

# Viðkomandi ásetingar

## Samtykki er í flestu førum óneyðugt

Viðgerð av myndum av børnum og starvsfólki, er viðgerð av persónupplýsingum, sum er fevnd av dátuverndarlógini. Lóglig viðgerð av myndum krevur heimildargrundarlag. Dagstovnar, óansæð almennir ella privatir, kunnu í flestu førum nýta myndir av børnum og starvsfólki við øðrum heimildum í dátuverndarlógini enn samtykki. Men at leggja myndir út á heimasíðu vil sum oftast krevja samtykki, tí tað er meira víðgongt fyri hin einstaka.

## Almennar stovnar

Hesin parturin er eisini galdandi fyri sjálvsognarstovnar, sum hava rakstaravtalu við kommununa. Fyri almennu stovnarnar er nýtslan av myndum ofta neyðug til almenna myndugleikaútinnan sbrt. dátuverndarlógini §8, stk. 1, nr. 5.

At kunna foreldur er týðandi og neyðugt í mun til ábyrgdina hjá kommununi at hava dagstovnatilboð. Tí verður mett sum neyðugur partur av myndugleikaútinnani hjá kommununi, at stovnurin tekur myndir av børnum og møguligum starvsfólki fyri, síðani at deila myndirnar innanhýsis við foreldur fyri at kunna um gerandisdagin hjá børnunum.
Á sama hátt verður tað mett at vera ein neyðugur partur av uppgávunum hjá myndugleikanum, tá stovnurin setir myndir av børnunum á klædnarúmini, soleiðis at børnini kenna rúm sítt aftur. Tað sama er galdandi, um tað hanga bólkamyndir á stovninum av børnum og starvsfólki fyri at stuðla námsfrøðiliga virkseminum.

Tað er tí ikki neyðugt at fáa samtykki frá foreldrum og starvsfólki til hesi endamál. Tit eiga tó ikki at taka myndir av børnum og/ella starvsfólki í viðkvæmum støðum, og um foreldur og/ella starvsfólk ikki ynskja at myndir verða tiknar, eiga tit at samskifta við viðkomandi um tað.



Um tað er neyðugt fyri stovnin at taka myndir av børnunum, og at goyma tær, fyri at menna og skjalprógva námsfrøðiliga virksemið, krevst ikki samtykki, tí mett verður, at viðgerðin er neyðug fyri myndugleikaútinnanina.

Í ávísum førum kann gerast neyðugt, at stovnurin kunnar alment um sítt virksemi og nýtir myndir til tað. Tá er týdningarmikið, at stovnurin er tilvitaður um, at alstórur munur er á, at leggja myndir út alment og at leggja myndir á eitt lokað foreldrainnannet.
Talan er um onnur atlit, um talan er um børn við vardum navni og adressu.

Sum heild eigur man at halda seg til myndir av størri bólkum og ikki einstaklingamyndir. Um tit ivast í onkrari mynd, so lat vera at nýta myndina.